# Álit



## Endurskoðan av lóg um gransking

Mentamálaráðið 21. mars 2018

# Innihaldsyvirlit

Inngangur ..... 4

Arbeiðssetningurin hjá arbeiðsbólkinum ..... 6

Niðurstøður ..... 7

Tilmælini í stuttum ..... 7

Lýsing av arbeiðinum ..... 8

Frágreiðing um viðgerð og tilmæli ..... 9

1. Viðgerð av lógini um gransking í mun til verandi og framtíðar tørv og karmar ..... 9

Tilmæli 1 ..... 10

2. Lýsing av verandi skipan við Vísindaráðnum, serliga kjølfesting í mun til verksetan, og tilmæli um tillagingar ..... 11

Tilmæli 2 ..... 11

3. Endurskoðan av nevndar- og ráðsbygnaðinum og áseting av førleikakrøvum til ymsu liðini í skipanini fyri at tryggja armslongdarprinsippið ..... 13

Tilmæli 3 ..... 13

4. Viðgerð av lógini í mun til altjóða samstarv, serliga ES-granskingarsamstarvið og norðurlendskt samstarv, herundir spurningar um samfígging og samskipan av verkætlanum, netverk v.m. ..... 15

Tilmæli 4 ..... 15

5. Viðgerð av spurninginum um løgfrøðiligu støðuna hjá Granskingargrunninum og hinum stuðulsgrunnunum/-játtanunum serliga í mun til støðling av játtan, mvg-afturbering v.m. ..... 17

Tilmæli 5 ..... 17

6. Uppskot til fyrisitingarligan bygnað fyri økið, harundir møguliga samanlegging/samskipan av stuðulsgrunnum/-játtanum ..... 18

Tilmæli 6 ..... 18

Fylgiskjal 1 - Stuðulsskipanir ..... 19

Føroyskar skipanir ..... 19

Granskingargrunnurin ..... 19

Vinnuframi ..... 19

Fiskivinnuroyndir ..... 19

Fiskivinnugrunnurin ..... 19

Altjóða skipanir ..... 19

Horizon 2020 ..... 19

NordForsk ..... 20

Nordic Innovation ..... 20

NORA ..... 20

NPA - The Northern Periphery and Arctic ..... 20
Fylgiskjal 2 – Orðafrágreiðingar ..... 21
Fylgiskjal 3 – Uppskot til bygnað fyri ráð, nevndir og fyrisiting ..... 23
Fylgiskjal 4 – Framløga um Lóg um gransking 22. mai 2017 ..... 25
Fylgiskjal 5 – Notat um Vísindaráðið ..... 28
Fylgiskjal 6 – Framløga um álitið fyri landsstýrinum 29. januar 2018 ..... 34
Fylgiskjal 7 – Slóðir til ymiskt viðkomandi tilfar ..... 35
Lógir um gransking, menning og nýskapan ..... 35
Skipanir í grannalondunum – Gransking, menning og nýskapan ..... 35
OECD hagtøl ..... 36
Allýsingar o.a. í dk lógaruppskoti um videnskabelig uredelighed m.v. ..... 36
Persónsupplýsingarøkið og Data sharing ..... 36
Javnstøða ..... 36
Open Access til útgávur og dátur ..... 36
Faklig meting av umsóknum ..... 36
Um granskingarintegritet ..... 36
Skráseting av útgávum ..... 37

# Inngangur

Umboð fyri Granskingarráðið og Mentamálaráðið hava í eina tíð umrøtt tørvin á at dagføra lógarverkið um gransking í Føroyum. Tað er serliga lóg um gransking frá 2001, broytt í 2006, ið fevnir um virksemið hjá Granskingargrunninum og Granskingarráðnum, sum hevur verið umrødd, bæði fyri tær ásetingarnar, sum treingja til dagføringar, og fyri vantandi ásetingar fyri ymiskt virksemi. Harafturat hevur ynski um meira samstarv og samvirkan millum líknandi skipanir javnan verið til umrøðu.

Semja hevur verið um, at karmarnir ikki eru nøktandi fyri tær uppgávur og tey ynski, sum hava verið til og fyri økið. Tí varð á vári 2017 farið undir arbeiðið at endurskoða lóg um gransking.

Í skrivi frá Rigmor Dam, landsstýriskvinnu í granskingarmálum, til stjórnarráð og stovnar, sum varða av arbeiðinum við gransking, verður í áheitanini um tilnevning av limum í arbeiðsbólkin, sagt, at:

> "Fleiri landsstýrisfólk varða av gransking, menning og nýskapan. Fleiri almennir stovnar hava gransking sum lutvísan ella umfatandi part av sínum virksemi. Eisini eru fleiri grunnar, sum veita stuðul til hesi endamál. Vísindaráðið mælti í 2011 til økt samstarv bæði millum granskingarstovnarnar og millum stuðulsfyrisitingarnar. Mett verður, at eyðsýndir fyrimunir eru fyri meira samstarvi enn í dag og at hetta átti at verið skipað við lóg.
>
> Lógin um gransking tørvar at verða endurskoðað og dagførd í mun til ta menning, sum hevur verið á økinum í Føroyum og úti í heimi síðani 2006. Skipanin við Vísindaráðnum, sum kom í lógina í 2006, hevur ikki virkað nóg væl, so tørvur er á at fáa gjørt tillagingar. Stuðul kann sambært lógini verða veittur til granskingarverkætlanir, sum fevna um vinnumenning og vinnugransking, men orðingarnar hava í praksis víst seg ikki at vera hóskandi.
>
> Rigmor Dam, landsstýriskvinna, ynskir at seta arbeiðsbólk umboðandi Mentamálaráðið, Fiskimálaráðið, Heilsumálaráðið, Uttanríkis- og vinnumálaráðið, Vinnuhúsið, Fróðskaparsetrið og Granskingarráðið at arbeiða við uppskoti um loysn fyri tættari samstarvi á økinum og at lýsa tørvin á broytingum í lógini um gransking, sí eisini hjálagda arbeiðssetning. Mentamálaráðið fer at hava formansskapin, meðan skrivstovan hjá Granskingarráðnum hevur skrivaraleiklutin og samskipar arbeiðið."

Tann 9. mai 2017 varð ein arbeiðsbólkur tilnevndur. Fyrsti fundur var 22. mai.

Í arbeiðsbólkinum hava verið:

- Birita Ludvíksdóttir, løgfrøðiligur ráðgevi í Heilsu- og Innlendismálaráðnum
- Guðrið Andorsdóttir, stjóri á Ílegusavninum, táverandi forkvinna í Granskingarnevndini
- Niels Winther, ráðgevi í Føroya Arbeiðsgevarafelag
- Øyvindur av Skarði, fulltrúi í Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
- Rúni Rasmussen, deildarstjóri á Løgmansskrivstovuni
- Sigurð í Jákupsstovu, rektari á Fróðskaparsetrinum
- Súsanna Nolsøe, fulltrúi í Fíggjarmálaráðnum
- Ulla Svarrer Wang, ráðgevi í Fiskimálaráðnum
- Wilhelm E. Petersen, stjóri á Vinnuháskúlanum, og núverandi formaður í Granskingarnevndini

Formansskapur, Mentamálaráðið:

Martin Næs, deildarstjóri

Kristianna Sjóvará, fulltrúi

Alda Joensen, fulltrúi

Skrivaraleiklutur og samskipan, Granskingarráðið

Annika Sølvará, stjóri

Maria Húsgarð, fulltrúi

**Mentamálaráðið tann 21. mars 2018**

## Arbeiðssetningurin hjá arbeiðsbólkinum

1. Viðgera lógina um gransking í mun til verandi og framtíðar tørv og karmar.

2. Lýsa verandi skipan við Vísindaráðnum, serliga kjølfesting í mun til verksetan, og koma við tilmæli um tillagingar.

3. Endurskoða nevndar- og ráðsbygnaðin og áseta førleikakrøv til ymsu liðini í skipanini fyri at tryggja armslongdar prinsippið.

4. Viðgera lógina í mun til altjóða samstarv, serliga ES-granskingarsamstarvið og norðurlendskt samstarv, herundir spurningar um samfígging og samskipan av verkætlanum, netverk v.m.

5. Viðgera spurningin um løgfrøðiligu støðuna hjá Granskingargrunninum og hinum stuðulsgrunnunum/-játtanunum serliga í mun til støðling av játtan, mvg-afturbering v.m.

6. Gera uppskot til fyrisitingarligan bygnað fyri øki, harundir møguliga samanlegging/samskipan av stuðulsgrunnum/-játtanum.

# Niðurstøður

Tað er gjørd frágreiðing um viðgerðina og niðurstøður í mun til einstøku spurningarnar í arbeiðssetninginum og tilmæli til myndugleikarnar. Tilmæli verða gjørd fyri hvørt av teimum seks punktunum í arbeiðssetninginum.

## Tilmælini í stuttum

1. Gera nýggja rammulóg um ráðgeving og stuðul til gransking, menning og nýskapan við eini sterkari fyrisitingarligari eind, sum beinanvegin ella við tíðini kann umsita ymsar stuðulsskipanir til økini gransking, menning og nýskapan. Fyrisitingin skal hava samskipandi leiklut í mun til strategiska ráðgeving, altjóða samstarv og tvørgangandi evni. Heimildir skulu ásetast at kunna taka ímóti stuðli frá øðrum og til at kunna luttaka í altjóða samstarvi. Staðfesta í lógini, at virksemið hjá einstøku stuðulsskipanunum skal verða ásett í kunngerð frá avvarðandi aðalráði við heimild í hesi rammulóg.

2. Avtaka Vísindaráðið og stovnseta nýtt ráð fyri gransking, menning og nýskapan. Ráðið skal við hjálp frá fyrisitingini gera árligar frágreiðingar um gongdina á økinum og við aktuellum evnum. Skipast skal fyri regluligum kjaki millum ráðið, politisku skipanina, aðalráðini og onnur.

3. Áseta nýggjan fyrisitingarligan bygnað. Áseta yvirskipaða heimild í lógina at velja stýri, nevndir og ráð. Áseta førleikakrøv yvirskipað í lóg og ítøkiliga í avvarðandi kunngerðum. Lýsa og skilmarka hugtøk í sambandi við førleikakrøv.

4. Áseta endamál og greiðar heimildir fyri altjóða samstarvi um gransking, menning og nýskapan. Seta national mál fyri altjóða luttøku, samskipa nationala og altjóða arbeiðið fyri gransking, menning og nýskapan, og skapa rúm fyri bestu gagnnýtslu av altjóða skipanum.

5. Kanna roknskapar- og skattaviðurskiftini, grunna- og stovnsspurningin gjølligari. Áseta yvirskipað regluverk fyri allar stuðulsskipanir, sum eru ella kunnu verða fevndar av nýggju rammulógini.

6. Áseta í lógini, at tað skal vera møguligt at savna fleiri ella allar verandi fyrisitingar á granskingarøkinum í eina størri eind, sum fevnir um ráðgeving, altjóða samstarv, fyrisiting av stuðli v.m. Mælt verður til økt samstarv millum verandi stuðulsfyrisitingar beinanvegin. Staðseting undir somu lon hevði stuðlað undir økt samstarv og vitanardeiling.

## Lýsing av arbeiðinum

Bólkurin hevur havt 8 fundir í tíðarskeiðinum frá 22. mai 2017 til 5. februar 2018.

Umboðini fyri Mentamálaráðið og Granskingarráðið hava havt fleiri fundir og arbeiðsdagar, har bulurin í frágreiðing og tilmæli vóru skrivað.

Fyrsta uppskotið varð viðgjørt av arbeiðsbólkinum á fundi 22. november 2017. Her vóru fleiri viðmerkingar og ynski um tillagingar. Samtykt varð, at Mentamálaráðið og Granskingarráðið skuldu arbeiða við innkomnu viðmerkingunum og gera eitt endurskoðað uppskot.

Eitt nýtt uppskot varð sent arbeiðsbólkinum til viðmerkingar 18. desember. Hetta varð síðani viðgjørt á fundi 12. januar og 5. februar 2018. Endaligt uppskot til tilmæli varð sent bólkinum til góðkenningar 7. mars 2018.

Við hesum handar bólkurin Rigmor Dam, landsstýriskvinnu í mentamálum, álit til støðutakan.

Í mun til framhaldandi arbeiðið hevur bólkurin hesi tilmæli:

- Mælt verður til, at ein lítil innanhýsis arbeiðsbólkur verður settur at gera uppskot til lóg við grundarlagi í hesum arbeiðinum.

- Mælt verður til, at hetta lógaruppskotið verður lagt fyri hendan arbeiðsbólkin til viðmerkingar aftur, áðrenn tað verður sent til formliga hoyring hjá avvarðandi pørtum.

- Mælt verður til, at lógaruppskotið síðani verður sent til hoyringar við innleiðandi kunningarfundi og eftir hetta eini rímiligari freist, so allir partar fáa høvi at kunna seg væl við ætlanirnar og gera viðmerkingar.

## Frágreiðing um viðgerð og tilmæli

Niðanfyri er frágreiðing um viðgerðina og niðurstøður í mun til einstøku spurningarnar í arbeiðssetninginum og tilmæli til myndugleikarnar.

### 1. Viðgerð av lógini um gransking í mun til verandi og framtíðar tørv og karmar

Lóg um gransking er frá 2001, broytt í 2006, og er tí ikki serliga gomul sum lóg. Hóast hetta, so er sera nógv hent á økinum bæði í Føroyum og í londunum, sum vit samstarva við, hesi árini. Høvuðsbroytingin, sum sæst í dagførdari lóggávu á økinum í grannalondum okkara og í nationalum og altjóða stuðulsskipanum, er, at tað í dag í alt størri mun er samband og samstarv millum gransking, menning og nýskapan. Fyri 15 árum síðani vóru hesi øki í størri mun skipað hvør sær.

Virkisøkið hjá Granskingarráðnum, sum er skrivstova hjá Granskingargrunninum, varð ásett í lógini, men er síðani víðkað munandi við avhending frá Mentamálaráðnum. Í 2007 varð ítøkiliga farið undir at fyrireika luttøku í ES-granskingarsamstarvsskránni og ábyrgdin av hesum samstarvi varð við tíðini í alt størri mun løgd til Granskingarráðið, uttan tó at galdandi lóg hevur verið dagførd.

Heitið á lógini frá 2001 fevnir í ávísan mun víðari enn tað virksemið, sum verður ásett í lógini í dag. Nógv gransking fer fram í Føroyum, sum ikki er reguleráð við hesi lóg. Hetta er serliga granskingin, sum fer fram á Fróðskaparsetrinum og ymsu granskingarstovnunum, men eisini í vinnuni.

Lógin er søguliga ætlað sum lóg fyri virksemið hjá Granskingargrunninum, sum stuðlar einum parti av føroyskari gransking. Hinvegin er lógin aftaná 2006 víðkað út um virksemið hjá Granskingargrunninum, tí uppgávurnar hjá Vísindaráðnum fevna nógv breiðari.

Granskingarráðið hevur í dag ein virknan lut í norðurlendskum og altjóða samstarvi um gransking, menning og nýskapan vegna Føroyar. Umboð fyri onnur aðalráð eru eisini virkin vegna Føroyar í norðurlendskum og altjóða samstarvi á teirra virkisøkjum. Einki av hesum altjóða samstarvi sæst í lóg um gransking ella aðrari føroyskari lóggávu. Tað er tørvur á at fáa sett orð á og karmar fyri hesum samstarvi í lógarverkinum. Serliga er tørvur á at fáa ásett heimildir til fíggjarliga partin av slíkum samstarvi, har eitt nógv nýtt amboð er samfígging millum lond og stuðulsskipanir. Hesar heimildir eru ikki nóg greiðar í dag. Sí eisini brot 4.

Tað er semja um, at tað er neyðugt og mest praktiskt at gera eina heilt nýggja lóg fyri økið, heldur enn at broyta og pjøssa ta gomlu lógina og tær ótíðarhóskandi viðmerkingarnar. Hetta gevur møguleika fyri at byrja heilt av nýggjum við endamáli, virkisøkið og við viðmerkingum, sum greina og lýsa lógina. Møguleiki verður at endurnýta teir góðu partarnar í verandi lóg, men sleppa tí, sum ikki hevur virkað eftir ætlan. Møguleiki verður eisini fyri at fáa eina lóg, sum samsvarar altjóða rákum á økinum.

Fleiri halda, at fyrisitingarnar av stuðulsskipanum á økinum áttu at verið savnaðar í eina eind, meðan tær ymsu stuðulsskipanirnar framhaldandi kundu og áttu at verið undir myndugleika og ávirkan frá avvarðandi aðalráði/landsstýrisfólki. Hugsanin er, at hetta kann styrkja fyrisitingina, sum fer at kunna veita eina betri og greiðari tænastu, verður munadyggari og minni viðbrekin fyri vitanarmissi í sambandi við starvsfólkaskifti.

Onnur halda ikki, at hetta er rætta leiðin at fara. Hesi halda, at ein miðsavning av fyrisitingunum kann koma at minka um ávirkanina hjá einstaka aðalráðnum/landsstýrisfólkinum og við tí áhugan fyri økinum. Hesi vísa

eisini á, við tilvísing til royndir úr grannalondunum, at tað er størri vandi fyri at skerja økið fíggjarliga, um alt er í einari skipan. Somuleiðis kann vandi vera fyri, at ávísar stuðulsskipanir í eini felags eind fyrisitingarliga verða raðfestar, meðan aðrar verða niðurraðfestar.

Partarnir eru tó samdir um, at mæla til økt samstarv í fyrsta umfari og at tað møguliga seinni ber til at savna fyrisitingarnar, um politiskt ynski er um tað. Tí verður mælt til gera eina nýggja lóg, sum kann rúma hesum, tá tíðin er búgvin. Sí brot 3 í hesum sambandi.

## Tilmæli 1

Mælt verður til at gera eina nýggja lóg í staðin fyri verandi lóg um gransking. Talan skal vera um eina rammulóg. Hendan lógin skal fevna um strategiska ráðgeving um gransking, menning og nýskapan í Føroyum og um formligar karmar til fyrisiting av skipanum, sum lata stuðul til gransking, menning og nýskapan, innlendis og altjóða samstarv á hesum økinum, kunningarvirksemi v.m.

Mælt verður til, at lógin skal vera karmur um eina sterka fyrisitingarliga eind, sum við tíðini kann umsita ymsar stuðulsskipanir til økini gransking, menning og nýskapan. Fyrisitingin skal hava samskipandi leiklut í mun til strategiska ráðgeving, altjóða samstarv og tvørgangandi evni, sum kunning, infrakervi, open acces, etikk v.m.

Mælt verður til, at tað í lógini verður staðfest, at tað við kunngerð skal bera til at fyrisita fleiri stuðulsskipanir við støði í hesi lógini seinni, tá/um politiskt ynski er um tað.

Mælt verður til, at tað í lógini verður ásett, at virksemið hjá einstøku stuðulsskipanunum, sum ynski er um at leggja undir hesa lóg, skal verða ásett í kunngerð frá avvarðandi aðalráði við heimild í hesi rammulóg.

Mælt verður til, at tað verður ásett í yvirskipaðari heimild at fyrisita stuðulsskipanir við teimum amboðum, sum slíkar krevja í mun til roknskaparkunngerðir v.m.

Mælt verður til, at tað verður givin formlig heimild til at taka ímóti uttanhýsis stuðli, bæði almennum og privatum, føroyskum og útlendskum.

Mælt verður eisini til áseting, sum ger tað møguligt at játta pening til altjóða samstarv á virkisøkinum til samfíggjaðar skipanir, sum vinna alt meira fram.

Mælt verður til, at tað í viðmerkingunum verður staðfest, at hendan lógin í í øllum førum skal nýtast til at fevna um uppgávurnar, sum í dag liggja hjá Granskingarráðnum, sum er fyrisitingin hjá verandi Granskingargrunni, umframt tær uppgávurnar, sum standast av hesi lóg. Víðari, at virksemið kann víðkast til at fevna um aðrar stuðulsskipanir til gransking, menning og nýskapan – eins og ásett omanfyri.

Mælt verður til, at hendan fyrisitingarliga eindin verður styrkt beinanvegin, og so møguliga aftur, so hvørt hon fær álagt nýggjar uppgávur.

Mælt verður til, at lógin fær heiti, sum samsvarar virkisøkinum. Hon kundi til dømis verið kallað "Lóg um ráðgeving og stuðul til gransking, menning og nýskapan við meira".

## 2. Lýsing av verandi skipan við Vísindaráðnum, serliga kjølfesting í mun til verksetan, og tilmæli um tillagingar

Í 2006 varð skipanin við Vísindaráðnum ásett í lógini um gransking. Íblásturin til Vísindaráðið kom serliga úr Finnlandi og úr Íslandi. Sambært lógini skal Vísindaráðið orða yvirskipaða granskingarpolitikk Føroya við felags hugsjón, sum fevnir um gransking, menning og nýskapan.

Arbeiðið við granskingarpolitikkinum var síðani bæði tungt og drúgt.

Vísindaráðið fór til verka í 2008. Í januar 2011 var yvirskipaður granskingarpolitikkur samtyktur undir yvirskriftini *"Vitan & Vøkstur. Yvirskipaði granskingarpolitikkur Føroya 2011-2015"*.

Í framhaldi av hesum arbeiði varð Granskingarráðið biðið um at gera eitt uppskot til verksetan av granskingarpolitikkinum. Uppskot til verksetan varð lagt fram á landsstýrisfundi í mars 2013. Síðani var ætlanin, at tað skuldi leggjast fyri Løgtingið til aðalorðaskifti. Hetta hendi ikki. Síðani er einki formliga hent við politikkinum ella ætlanini um verksetan.

Bólkurin er samdur um, at tað er stórur tørvur á ráðgeving á hesum økinum. Framyvir eigur hetta tó at skipast øðrvísi enn í dag. Tað er neyðugt at broyta skipanina við Vísindaráðnum grundleggjandi. Tað hevur ikki virkað nóg væl at hava politiska umboðan í hesum ráðnum, sum hevði til uppgávu at orða yvirskipaðan granskingarpolitikk, og sostatt óbeinleiðis hevði til uppgávu at ráðgeva somu politisku skipan.

Tað eigur í nýggjari skipan at vera skapt møguleiki fyri neyvum sambandi millum eina ráðgevandi eind, politisku skipanina og aðrar avvarðandi partar.

### Tilmæli 2

Mælt verður til at fara frá skipanini við Vísindaráði í verandi líki.

Mælt verður til at stovnseta eina nýggja ráðgevandi skipan, har ábyrgdar- og arbeiðsbýtið millum politisku skipanina, aðalráðini og stuðulsskipanir til gransking, menning og nýskapan verður greiðari og arbeiðið kann vera smidligari og dyggari.

Mælt verður til at skipa eitt "Ráð fyri gransking, menning og nýskapan". Hetta skal vera ráðgevandi ráð til politisku skipanina og aðalráðini. Fyrisitingarliga eindin hjálpir ráðnum, ger greiningar og gevur fakligt input til ráðið. Sí fylgiskjal 3.

Mælt verður til, at Ráðið skal hava 7 limir, sum verða tilnevndir av Mentamálaráðnum. Hesir verða valdir av lista við grundaðum uppskotum, sum skulu koma frá Løgmansskrivstovuni, øllum aðalráðunum, Føroya Arbeiðsgevarafelag og arbeiðstakarafeløgunum. Limirnir skulu tilnevnast vegna teirra fakligu royndir, førleikar, innlit og persónligu eginleikar. Ráðið skal verða sett saman, so tað tilsamans umboðar vitan og royndir við gransking, menning og nýskapan í almenna og privata geiranum á flestu høvuðsøkjum.

Mælt verður til at áleggja nýggja ráðnum at gera árligar frágreiðingar um gransking, menning og nýskapan. Hetta skal gerast við stuðli frá fyrisitingini (í hesi skipanini) og við hoyring hjá viðkomandi pørtum. Íblástur til at skipa arbeiðið kann fáast frá skipanini kring Búskaparráðið og úr grannalondunum. Frágreiðingarnar skulu leggjast fram til kunningar og kjak fyri landsstýrisfólki, aðalstjórum og øðrum lyklafólkum á afturvendandi

árligum tiltaki á vári, áðrenn fíggjarkarmarnir verða ásettir. Mælt verður til at skipa fyri aðalorðaskifti í Løgtinginum við støði í hesum frágreiðingum, hvørja ferð nýggj samgonga er skipað.

## 3. Endurskoðan av nevndar- og ráðsbygnaðinum og áseting av førleikakrøvum til ymsu liðini í skipanini fyri at tryggja armslongdarprinsippið

Tað eru í dag fleiri nevndir og ráð við fólki, sum stjórna ymsu stuðulsskipanunum. Tilsamans er talan um í minsta lagi 25 sessir. Av hesum er onkur innanhýsis skipan, har limir ganga aftur í ymsum liðum uttan eyka samsýning. Harafturat er Vísindaráðið sum yvirskipað ráðgevandi eind, sum kann hava upp til 16 limir. Hetta Vísindaráð er ikki virkið í løtuni.

Ítøkiliga er talan um hesar skipanir:

*Granskingargrunnurin* hevur sambært løgtingslóg eina Granskingarnevnd við 7 limum. *Sjúkrakassagrunnurin* hevur sambært ásettum leiðreglum eina faknevnd við 5 limum. *Vinnu ph.d.-skipanin í Granskingarráðnum* hevur eina nevnd við 3 limum, sum Granskingarnevndin hevur sett. *Útgávustuðulsskipanin í Granskingarráðnum* hevur eina nevnd við 3 limum, sum Granskingarnevndin hevur sett.

*Vinnuframi* hevur sambært løgtingslóg eitt stýri við 5 limum.

*Fiskivinnuroyndir* hevur eitt stýri við 5 limum, sum verður sett av Fiskimálaráðnum.

*Fiskivinnugrunnurin*, sum varð stovnssettur í 2017, skal sambært løgtingslóg hava eitt stýri við 5 limum.

Stuðulsskipanirnar hava ymisk endamál, ymsar uppgávur og krevja limir við ymsum førleikum. Limirnir verða í dag valdir/tilnevndir eftir tilmæli frá fleiri pørtum og við ymsum førleikakrøvum, alt eftir hvørjari skipan tey verða vald til.

Tað eru ein røð av sentralum hugtøkum, sum verða brúkt í ymsu skipanunum, sum ikki eru nærri lýst, t.d. gransking, menning, nýskapan, vinnugransking, granskingarførleiki, granskari, "forskningskyndig", vinnuserfrøðingur, v.m. Hetta gevur av og á høvi til kjak og tulkingar og kann elva til at mál, ið eru ógvuliga lík, fáa ymiska viðgerð.

Í eini rammulóg, sum hevur møguleika fyri at samskipa økið við tíðini, er tørvur á at áseta hóskandi førleikakrøv og mannagongdir fyri vali av limum til ymsu nevndirnar og ráðini, so líkar skipanir hava líknandi ásetingar. Er eitt nú talan um stuðul til gransking, so skulu granskarar og onnur við skili fyri gransking, verða í nevndunum, meðan tað eitt nú á menningar- og nýskapanarøkinum eiga at vera onnur krøv, t.d. til royndir frá menningarvirksemi, íverksetan og vinnulívi.

Nevndirnar/stýrini hava ymiskar uppgávur, frá formligari leiðslu til viðgerð og játtan av umsóknum.

Granskingarnevndin stjórnar í dag Granskingargrunninum og fyrisitingini hjá Granskingarráðnum. Í einum nýggjum bygnaði, sum skal kunna rúma fyrisiting av fleiri stuðulsskipanum og tænastum til eitt nýtt ráð fyri Vísindaráðið, er neyðugt at taka støðu til uppgávur og heimildir hjá Granskingarnevndini í framtíðini. Tað er eisini neyðugt at fáa semju um ein bygnað, sum beinanvegin ella við tíðini skal kunna fevna um stuðulsskipanir frá fleiri ymsum aðalráðum.

### Tilmæli 3

Mælt verður til, at tað verður ásettur ein nýggjur bygnaður, har fyrisiting Granskingarráðsins verður fyrisiting fyri allar stuðulsskipanir, sum verða lagdar undir hesa ætlaðu lóg, fyri nýggja ráðið fyri gransking, menning og nýskapan, fyri ES- granskingar- og menningarsamstarvið og møguliga aðrar fakliga viðkomandi uppgávur. Støddin á fyrisitingini má tillagast til ymsu uppgávurnar, sum verða álagdar henni. Mælt verður til at tryggja politiska og fíggjarliga undirtøku fyri hesum bygnaði, eisini frá teimum aðalráðum, sum í fyrsta umfari ikki ynskja at lata verandi stuðulsskipanir undir hesa lóg. Sí fylgiskjal 3.

Mælt verður til, at tað verður ásett yvirskipað heimild til at velja stýri, nevndir og ráð til ymsu liðini í strategisku ráðgevingini og til stuðulsskipanir, sum hendan lógin møguliga kann fevna um.

Mælt verður til at áseta førleikakrøv og mannagongdir fyri vali av limum, sum hóska til ymsu stuðulsskipanirnar. Eisini verður mælt til at áseta einsháttað valskeið og reglur um skifti, sum bæði tryggja framhald og nýskapan. Samsýningarleisturin eigur samstundis at verða endurskoðaður og einsháttaður.

Mælt verður til at lýsa og skilmarka hugtøk í sambandi við førleikakrøv til ráðs- og nevndarlimir og til umsøkjarar og umsóknir.

## 4. Viðgerð av lógini í mun til altjóða samstarv, serliga ES-granskingarsamstarvið og norðurlendskt samstarv, herundir spurningar um samfígging og samskipan av verkætlanum, netverk v.m.

Altjóða samstarv um gransking, menning og nýskapan sum slíkt er ikki ásett í viðkomandi føroyskari lóggávu. Hóast hetta, hava Føroyar undirskrivað avtalu við ES um samstarv um gransking og innovatión (Horizon 2020)[1].

Lóg um gransking er frá 2001 við broytingum í 2006. Hetta liggur áðrenn fyrstu formligu, føroysku ES-granskingaravtaluna, sum er frá 2010. Lógin leggur ikki upp fyri teimum viðurskiftum, sum ES-myndugleikar spyrja eftir og gevur heldur ikki í nóg stóran mun rúm fyri at gagnnýta teir møguleikar, sum eru, t.d. fyri samfígging av verkætlanum.

Tørvur er á heimildum og sjónliggerð av altjóða bindingum, sum tey, sum eru virkin í altjóða samstarvi um gransking, menning og nýskapan, kunnu brúka sum skjalprógv í sambandi við umsóknir, avtalur, sáttmálar o.a.

Tá talan er um luttøku í altjóða netverkum, kann tørvur vera á hagtølum og at prógva skipanir, sum eru góðskutryggjaðar til endamálið.

Tað er eisini neyðugt at skjalprógva, at arbeiðsumstøðurnar á føroyskum stovnum lúka altjóða viðurkend krøv í sambandi við starvsviðurskifti. Til hetta er ynskiligt við almennum ásetingum um granskingarfrælsi, etiskar reglur, handfaring av granskingartilfari og úrslitum v.m.

Stuðul ella onnur fígging úr altjóða grunnum verður í størri og størri mun skipað sum samfígging, har luttakaralandið skal koma við einum parti av upphæddini. At játta stuðul til hesi endamál krevur lógarheimild.

Skulu Føroyar gagnnýta altjóða møguleikar og samstarva um gransking, menning og nýskapan á viðkomandi økjum og vera við til at loysa alheims avbjóðingar yvir longri tíðarskeið, sum t.d. veðurlagsbroytingar, so skal lóggávan heimila og rúma hesum íløgum.

Landsstýrið eigur at seta sær ítøkilig mál fyri altjóða luttøku og eggja stovnum og fyritøkum at gagnnýta altjóða skipanirnar, sum Føroyar hava atgongd til. Eisini eigur at verða umhugsað at geva møguleika fyri at gera onkra bonusskipan, sum kann lata eyka stuðul úr Føroyum, um altjóða stuðul verður játtaður. Harafturat má arbeiðsorka setast av til at hjálpa stovnum og fyritøkum at gagnnýta skipanirnar til fulnar.

### Tilmæli 4

Mælt verður til at áseta endamál og greiðar heimildir fyri altjóða samstarvi um gransking, menning og nýskapan í lógini.

Mælt verður til at seta national mál fyri altjóða luttøku, eins og grannalond okkara gera.

---

1 Sáttmáli um vísindaligt og tøkniligt samstarv millum Føroyar og Evropeiska samveldið, ið atlimar Føroyar til Horizon 2020 – rammuskráin um gransking og innovatión (2014-2020)
http://logting.fo/files/casestate/15019/087.14%20Horizon%20Skjal%201%20Sattmali%20um%20visundaligt%20og%20tokniligt%20samstarv.pdf

Mælt verður til at gera eina eftirmeting av, hvat tað krevur at luttaka fult út í skipanunum, sum Føroyar luttaka í, og síðani at seta bæði neyðuga játtan og orku av til at gagnnýta hesar skipanir til fulnar.

Mælt verður til at samskipa nationala og altjóða arbeiðið, so til ber at gagnnýta førleikar, vitan og arbeiðsorku hjá starvsfólkum í teimum ymisku ráðunum, sum í teirra dagliga virksemi starvast innan granskingar-, menningar- og nýskapanarøkið.

Mælt verður til at áseta heimildir fyri at gera serlig átøk og bonusskipanir til teirra, sum fáa altjóða játtanir til gransking, menning og nýskapan til Føroya.

## 5. Viðgerð av spurninginum um løgfrøðiligu støðuna hjá Granskingargrunninum og hinum stuðulsgrunnunum/-játtanunum serliga í mun til støðling av játtan, mvg-afturbering v.m.

Stuðulsskipanirnar í dag - Granskingargrunnurin, Vinnuframi, Fiskivinnuroyndir og Fiskivinnugrunnurin - hava ymsar lógarkarmar at arbeiða undir.

Roknskaparøkið hjá tí almenna er tillagað seinnu árini, og í onkrum føri er lógarverkið kring stuðulsskipanir ikki fult í samsvari við dagsins roknskaparreglur og vegleiðingar.

Onkur óvissa hevur verið um handfaring av avlopi ella afturgjaldi av givnum játtanum hjá Granskingargrunninum. Tørvur er á at fáa avklárað slíkar spurningar.

Tað hevur týdning bæði fyri einstøku skipanirnar nú og fyri eina møguliga samskipan frameftir, at skipanirnar hava dagførdar og arbeiðsligar lógarkarmar at arbeiða við stuðulsøkinum.

Altjóða samstarv kann seta krøv í mun til umsiting, skatta- og avgjaldsreglur v.m.

### Tilmæli 5

Mælt verður til at kanna, um tørvur er á, at stuðulsvirksemi av hesum slag er skipað í eksternum grunni, ella um tað heldur eigur at skipast sum vanligur almennur stovnur.

Mælt verður til, at tað verður ásett yvirskipað regluverk við heimildum, sum er galdandi fyri allar stuðulsskipanirnar, sum við tíðini møguliga kunnu koma at verða fevndar av hesi lóg.

Mælt verður til at kanna, um tað er neyðugt at áseta ítøkiliga, at mvg-, eftirlønar- og skattaviðurskifti eru í samsvari við altjóða ásetingar, eitt nú konventiónir, sum áleggja londunum at frítaka granskingarútgerð fyri skatt og avgjøld.

## 6. Uppskot til fyrisitingarligan bygnað fyri økið, harundir møguliga samanlegging/samskipan av stuðulsgrunnum/-játtanum

Tað eru í dag í Føroyum fleiri skipanir, sum lata almennan stuðul til gransking, menning og nýskapan. Hesar eru skipaðar hvør sær í sjálvstøðugar eindir við hvør sínari pinkufyrisiting og ymiskum kørmum. Talan er um Granskingargrunnin, Vinnuframa og Fiskivinnuroyndir og frá 2017 eisini Fiskivinnugrunnin.

Tað hevur í mong ár verið tosað um eina størri samskipan ella samanlegging á økinum. Í granskingarpolitikkinum Vitan og Vøkstur frá 2011 varð mælt til at samskipa kappingarjáttanirnar og fyrisitingarnar.

Í Føroyum, eins og í grannalondunum, er vaksandi fokus á gransking, menning og nýskapan sum amboð til samfelags- og búskaparmenning. Hetta setur stór krøv til eina styrkta fyrisiting, sum kann samstarva tvørtur um fak og landamørk.

Bólkurin er ikki á einum máli um, hvussu best er at skipa økið frameftir. Tó ynskja tey flestu at savna alla fyrisiting í eina eind, meðan nøkur halda, at talan heldur eigur at verða um meira samstarv enn í dag. Øll eru tó á einum máli um, at tørvur er á at styrkja fyrisitingarorkuna á økinum munandi fyri at kunna lyfta ymsu uppgávurnar, ikki minst í mun til strategiska ráðgeving, tvørgangandi evni og altjóða samstarv.

### Tilmæli 6

Mælt verður til økt samstarv millum verandi stuðulsfyrisingar.

Mælt verður til at gera ásetingar í lógini, sum gera tað møguligt at savna fleiri ella allar verandi fyrisitingar á økinum í eina størri eind, um politiskt ynski er um tað. Eindin skal kunna fevna um ráðgeving, altjóða samstarv, fyrisiting av stuðli og aðrar uppgávur, sum eisini kunnu hugsast at verða lagdar til hesa fyrisitingina. Eindin skal kunna verða skipað í virkisøki, sum eru hóskandi til ymsu stuðulsøkini.

Um ella tá hetta verður veruleiki, skal hetta vera undir sama stjóra og við felags móttøku, bókhaldi, skjalagreiðslu, HR, heimasíðu og øðrum stápsfunktiónum.

Í fyrsta umfari skal fyrisitingin, sum er nevnd í fylgiskjali 3, lyfta uppgávurnar hjá Granskingarráðnum í dag við tilmæltu dagføringunum frammanfyri.

Semja er um, at meira samstarv millum fyrisitingarnar er ynskiligt og gagnligt. Staðseting undir somu lon hevði stuðlað undir økt samstarv og vitanardeiling. Ein stórur meiriluti mælir til at fara undir at savna allar fyrisitingarnar í felags høli skjótast gjørligt. Ein minniluti mælir frá at savna fyristingarnar av ymsu stuðulsjáttanunum.

# Fylgiskjal 1 - Stuðulsskipanir

## Føroyskar skipanir

### Granskingargrunnurin

Ásettur við lóg frá 2001 við broytingum í 2006. Letur stuðul til gransking og granskingargrundaða menning á øllum fakøkjum.

Ein árlig umsóknarfreist. Fær frá 30 til næstan 50 umsóknir árliga, játtar árliga stuðul til 8-12 verkætlanir.

Fíggjarlógarjáttan í 2018 er 7.5 mió. kr. til øll fakøki.

Verður umsitin av Granskingarráðnum, sum er fyrisiting við egnari játtan til endamálið. Fyrisitingin telur tilsamans 2,7 ársverk, og røkir umframt føroyska granskingarstuðulin eisini ES og norðurlendsk granskingarmál, yvirskipaða miðling og kunning á økinum o.a.

### Vinnuframi

Fyrr Vinnuframagrunnurin. Ásettur við lóg í 2001. Letur stuðul til menning, íverksetan, sølu og ráðgeving.

Umsóknarfreist eina ferð um mánaðin. Fær á leið 70-80 umsóknir árliga, játtar stuðul til 40-45 verkætlanir.

Fíggjarlógarjáttan í 2018 er 3.2 mió. kr. Harafturat verður avkastið av fænum tøkt til stuðul.

Verður umsitin av fyrisitingini hjá Vinnuframa, sum er fíggjað av omanfyrinevndu játtan.

### Fiskivinnuroyndir

Letur stuðul til royndir og kanningar, bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, í fiskivinnuni.

Ein árlig umsóknarfreist. Fær frá umleið 20 til umleið 40 umsóknir árliga, játtar stuðul til 15-30 verkætlanir.

Fíggjarlógarjáttan í 2018 er 7.2 mió. kr.

Verður umsitin av fyrisitingini í Fiskimálaráðnum. Stýrisbólkur samansettur av fólki úr vinnuni og almennum stovnum viðgerð umsóknirnar og letur tilmæli um hvørjar verkætlanir skulu stuðlast.

### Fiskivinnugrunnurin

Ásettur við lóg í 2017. Arbeitt verður við at fáa grunnin at virka í 2018.

## Altjóða skipanir

### Horizon 2020

Letur stuðul til gransking, menning og nýskapan, granskingarinfrakervi v.m. á øllum fakøkjum.

Nógvar ymsar skipanir við freistum eina til fleiri ferðir árliga. Bæði stovnar og fyritøkur kunnu søkja.

ES-skipan, sum er grundað á samstarv millum øll ES-londini og eina røð av atlimalondum, eitt nú Noreg, Ísland og Sveis. Føroyar hava verið atlimaland í samstarvinum síðani í 2010 og rinda eitt árligt limagjald, sum er roknað í mun til BTÚ. Øll atlimalond rinda eftir sama leisti. Gjaldið hjá Føroyum í 2017 var 11,6 mió. kr.

Føroyska NCP-tænastan (National Contact Point), sum er partur av hesum samstarvi, er í Granskingarráðnum.

## NordForsk

Letur stuðul til gransking á ymsum raðfestum økjum.

Norðurlendskur stovnur við stuðulsskipan, sum er fíggjað frá Norðurlandaráðnum og limalondunum Danmark, Finnland, Ísland, Noregi og Svøríki. Áland, Føroyar og Grønland hava eygleiðarastøðu í stýrinum fyri Nordforsk.

Føroyskir granskarar kunnu søkja á jøvnum føti við onnur í Norðurlondum.

## Nordic Innovation

Letur stuðul til nýskapan á ymsum raðfestum økjum.

Norðurlendskur stovnur við stuðulsskipan, sum er fíggjað frá Norðurlandaráðnum og limalondunum Danmark, Finnland, Ísland, Noregi og Svøríki. Føroyar hava eygleiðarastøðu í stýrinum fyri Nordic Innovation.

Føroyskir mennarar og íverksetarar kunnu søkja á jøvnum føti við onnur í Norðurlondum.

## NORA

Letur stuðul til samstarvsverkætlanir í Útnorði á ymsum raðfestum økjum. NORA letur vanliga ikki stuðul til verkætlanir, ið eru at meta sum granskingar- ella menningarætlanir.

Norðurlendskur stovnur við stuðulsskipan, sum er fíggjað frá Norðurlandaráðnum. Limalondini eru Føroyar, Grønland, Ísland og Noreg (strandaparturin). Skrivstovan liggur í Føroyum.

## NPA - The Northern Periphery and Arctic

Letur stuðul til verkætlanir á ymsum raðfestum økjum.

Samstarv millum 9 lond í arktiska økinum: Finnland, Føroyar, Grønland, Írland, Ísland, Norður Írland, Noreg, Stóra Bretland og Svøríki.

NPA 2014-2020 er partur av "the European Territorial Cooperation Objective" og verður fíggjarliga stuðlað av "the European Regional Development Fund (ERDF)" og líknandi grunnum frá ikki ES-londum.

## Fylgiskjal 2 – Orðafrágreiðingar

| | |
|---|---|
| Bologna | Bologna-tilgongdin er heiti fyri eitt millumtjóða evropeiskt samstarv um at skapa felags karmar fyri framhaldsútbúgvingar í Evropa. Bakstøðið fyri tilgongdina er Bologna-fráboðanin, sum varð samtykt í juni 1999 av úbúgvingarráðharrum fyri 29 evropeisk lond.<br><br>Í dag eru 48 lond og ein røð av ráðgevandi felagsskapum við í Bologna-tilgongdini. Endamálið við tilgongdini er at Evropa mennir seg til eitt felags øki fyri framhaldsútbúgvingar, har lesandi og granskarar frítt kunnu flyta seg um landamørk. Eitt annað týdningarmikið mál er at gera evropeiskar útbúgvingar áhugaverdar fyri lesandi úr øðrum heimspørtum. |
| Gransking, menning og nýskapan | OECD lýsir gransking og menningararbeiði (G&M) sum "virksemi við originalum burði, int á skipaðan hátt til at økja grunnin av vitan og til at nýta hesa vitan til at finna nýtt brúk". G&M umfatar:<br><br>Grundgransking - (basic research/science) - er royniligt og ástøðiligt virksemi, ið fyrst og fremst verður int til at fáa nýggja vitan til vegar um grundarlagið undir fyribrigdum og eygleiðingum uttan at hava serskild praktisk mál ella nýtslur fyri eygað.<br><br>Nýtt gransking - (applied science) - er virksemi við originalum burði til at finna nýggja vitan, ið fyrst og fremst er ætlað til praktisk endamál og nýtslur.<br><br>Menningararbeiði - (development) - er skipað arbeiði, ið nýtir kendan kunnleika, og miðar ímóti at framleiða nýtt tilfar, vørur og lutir, at innføra nýggjar tilgongdir, skipanir ella tænastur ella bøta tær, ið finnast.<br><br>Nýskapan - (innovation) - er eitt hugtak, ið ofta er knýtt at virksemi í vinnulívinum, men tað kann nýtast á flestu samfelagsøkjum. Við nýskapan verður ofta hugsað um:<br><br>- at endurnýggja og víðka vøru- og tænastuútboðið<br>- fáa til vegar nýggjar framleiðsluhættir, veitanir, marknaðarføring og útbreiðslu<br>- endurnýgging í leiðslu, skipan, arbeiðsviðurskiftum og førleika hjá starvsfólki.<br><br>Nýskapan kann væl fara fram uttan gransking og menning, men G&M er tó ofta - beinleiðis ella óbeinleiðis - ein samrunnin partur av nýskapanartilgongdini<br><br>Kelda: granskíng.fo |
| Granskaraútbúgving | Í dag verður kravt av komandi granskarum, at teir taka eina útbúgving omaná kandidat ella Master útbúgving. Talan er vanliga um eina 3 ára ph.d.-útbúgving sum er eitt millumstig millum útbúgving og starv.<br><br>Í Bologna høpi verður roknað við útbúgvingarstigunum Bachelor, Master og ph.d. Tey taka 3 + 2 + 3 = 8 ár Samansetingin kann vera eitt sindur øðrvísi onkustaðni, |

| | |
|---|---|
| | t.d. 4 + 4 ár. Summar útbúgvingar eru drúgvari, serliga læknaútbúgvingin, sum krevur sergreinar. |
| Granskingarførleiki | Fyri at kunna verða settur í starv sum granskari, verður faklig nevnd oftast sett at meta um granskingarførleikan. Sí eisini Granskari. |
| Granskari | Ein granskari er vanliga ein persónur við loknari granskaraútbúgving og/ella granskingarroyndum, sum arbeiðir við gransking. Talan er tó ikki um eitt vart heiti.<br><br>Granskarastørvini eru ofta flokkað í ymisk stig, alt eftir royndum. Á Fróðskaparsetrinum eru heitini adjunktur, lektari og professari. Á øðrum granskingarstovnum verða heitini granskari og seniorgranskari nýtt, men eisini fakligu heitini, t.d. havfrøðingur ella lívfrøðingur. |
| Granskingarinfrakervi | Granskingarinfrakervi fevnir um eina røð av ymiskari serligari útgerð og tólum, dátugrunnar, rannsóknarstovur v.m., sum tørvur er á í granskingararbeiðnum. Ofta er talan um dýra serútgerð, sum samstarvað verður um at keypa og reka, bæði nationalt og altjóða. |
| Samfígging – Cofund | Amboð, sum verður alt meira nýtt til fígging av altjóða granskingar- og menningarvirksemi. Í Horizon 2020 virkar Cofund skipanin soleiðis, at lond ella stovnar/virkir kunnu taka seg saman og søkja stuðul til eitt ávíst evni, t.d. burðardygga veiðu. Tey bjóða seg til at koma við parti av fíggingini, um ES-skipanin vil fíggja ein part. Ein vanligur fíggingarleistur er, at partarnir, sum søkja, koma við 60-66% meðan t.d. Horizon 2020 ella NordForsk kunnu lata 40-33%. |
| Stuðulsskipanir ella -játtanir | Í hesum høpinum er talan um Granskingargrunnin (herundir Sjúkrakassagrunnin), Vinnuframa, Fiskivinnuroyndir og í næstum eisini Fiskivinnugrunnin. |
| Vinnugransking | Tað er eingin neyv skilmarking av hugtakinum vinnugransking. Hetta verður oftast nýtt um gransking, sum fer fram í vinnuni ella í neyvum samstarvi við vinnuna. Vinnugransking er oftast gransking, sum verður flokkað sum nýtt gransking ella menning. |

# Fylgiskjal 3 – Uppskot til bygnað fyri ráð, nevndir og fyrisiting




<u>Skipan av felags fyrisitingini og møguleikar fyri at víðka, tá/um fleiri skipanir verða lagdar til hesa fyrisitingina</u>



## Stýrið/nevndin fyri nýggju organisatiónina

- Ásetast í lógini
  - Eitt umboð (formaðurin/forkvinnan) úr hvørju faknevnd og úr Ráðnum fyri gransking, menning og nýskapan (sum er føddur formaður/forkvinna) – kanska eisini áseta eitt minsta tal av limum
  - Setanarskeið sama sum í faknevndin – forskjóta tilnevningarnar í nevndunum, sum tað til ber at skifta helvtina hvørja ferð
  - Samsýning
  - Uppgávur

## Lógarrúm fyri fleiri stuðulsskipanum

- Tað má ásetast í lógini
  - At tað kunnu vera fleiri javnfjarðar stuðulsskipanir við hvør sínari faknevnd
  - At tað skal vera rúm fyri ymsum sløgum av stuðulsskipanum til ymisk endamál, sum øll skulu skipast í mun til yvirskipaðar ásetingar í lógini
  - At stuðulsskipanir skulu skipast neyvt í kunngerð frá avvarðandi aðalráði við heimild í lógini
  - At tað skal bera til at taka ímóti stuðli frá øðrum enn fíggjarlógini til virksemi innanfyri karmarnar á hesi lógini
  - At allur stuðul skal umsitast sambært almenna regluverkinum og undir eftirliti av Landsgrannskoðanini

## Faknevndir

- Ásetast í lógini
  - Yvirskipað tal av limum (t.d. 3-5), at tær skulu umboða viðkomandi partar, hetta skal ítøkiliggerast í einstøku kunngerðunum og kemur at variera frá skipan til skipan
  - Yvirskipað førleikakrøv til limir til ymsu sløgini av stuðulsskipanum (G, M & N)
  - Setanarskeið ( t.d. 4 ár, skifta helvtina av nevndini hvørja ferð?)
  - Samsýning (heimild at seta hetta í kunngerð, líka løn fyri sama arbeiði)
  - Yvirskipað slag av uppgávum, ítøkiliggerast í kunngerð

## Rúm fyri ymsum stuðulsskipanum

- Ymsar almennar skipanir
  - Við árligari játtan á FL: Granskingargrunnurin, Fiskivinnuroyndir, Vinnuframi
  - Raðfest øki í nøkur ár: Sjúkrakassagrunnurin
  - Aðrar stuðulsskipanir til ávís øki, evni ella slag
- Ymsar privatar skipanir
  - Til dømis fæ úr øðrum grunnum, stuðul frá fyritøkum til ávís evni/øki
- Almenn/privatar skipanir
  - Til dømis játtan til vinnu-ph.d. við stuðli frá FL og frá fyritøkum.

# Fylgiskjal 4 – Framløga um Lóg um gransking 22. mai 2017

## Lóg um gransking

granskingarráðið

## Skrá

- Søgan hjá Lóg um gransking
- Orsøkirnar til og grundarlagið undir arbeiðsseiningini
- Lýsing av skipanum í Føroyum og í grannalondunum
- Tankar um skipan av arbeiðinum

## Løgtingslóg um granskingarráð 1996

- § 1 Granskingarráð til frama fyri føroyska gransking
- Einki granskingarráð í Føroyum
- Gransking á ymiskum vísindaligum økjum er einki nýtt fyribrigdi
- Virkisøkið er náttúruvísindi, teknisk vísindi, læknavísindi, fiskivinna, landbúnaður og umhvørvi, hugvísindi og samfelagsvísindi
- Skal fylgja menningini innan føroyska og millumtjóða gransking og gera tilmæli um, hvussu gransking skal stuðlast

## Áhugaverd viðmerking

- Granskingin her í landinum skal í neyðugan mun samskipast við gransking í øðrum londum. Fyrst í Norðurlondum og síðani í EU. Føroyskum granskarum skal tryggjast møguleiki fyri at hava neyðugt samstarv við starvsfelagar í øðrum londum, og teir skulu kunna taka lut í granskingarætlanum, sum eru felags fyri fleiri lond. Í hesum sambandi skal upplýsast um stuðulsmøguleikar í Norðurlondum og EU.

## Løgtingslóg um gransking 2001

- Stutt niðurstøða um virksemið hjá Granskingarráði Føroya:
- ...politisku myndugleikarnir ikki hava nýtt granskingarráðið til annað, enn at viðgera og tilmæla granskingarstuðul, sum landsstýrismaðurin í granskingarmálum hevur sett av á § 7 í árligu løgtingsfíggjarlógunum.
- Hinir landsstýrismenninir hava ikki gjørt nýtslu av granskingarráðnum, hóast heimildir annars eru fyri hesum í lógarásettu uppgávum ráðsins.

## Løgtingslóg um gransking 2001

- Granskingargrunnurin verður skipaður sum sjálvstøðugur stovnur, sum hevur til endamáls at stuðla gransking.
- Granskingarnevndin hevur ovastu leiðsluna yvir grunninum...
- Nevndin hevur ávísar uppgávur, sum verða lagdar til stjóran – ráðgeva landsstýri og vinnu í granskingarpolitiskum spurningum, leiðbeina og ráðgeva granskarum í granskingarspurningum.

## Nevndin

- Granskingargrunnurin verður skipaður við einum granskingarráð við 7 limum.
- Landsstýrimennirnir í ávikavíst heilsumálum, vinnumálum, fiskimálum og granskingarmálum tilnevna hvør sín lim til ráðið fyri grunnin, meðan Føroya Arbeiðsgevarafelag velur 2 umboð til ráðið.
- Afturat hesum tilnevnir landsstýrismaðurin í granskingarmálum formannin

## Broytingarlógin 2006

- Føroya Vísindaráð, ið skal orða tann yvirskipaða strategiska granskingarpolitikkin, sum við felags hugsjón eigur at fevna um gransking, menning og nýskapan í Føroyum.
- ...serlig høvuðsøki verða raðfest fyri ávíst tíðarskeið, samstundis sum fíggjarligu fløgurnar fylgja við.
- 14 limir + formaðurin í Granskingarnevndini hevur møtiskyldu

## Eygleiðing - førleikakrøv

Úr fundarfrásøgn í MMR í januar 2006 í sambandi við Granskingarnevnd og Vísindaráð:

- Hjalti í J. vísti á, at hann saknar fólk, sum granska í "Granskingargrunninum" – fólk við skil fyri granskingarstrategi og granskingarførleika í sambandi við viðgerðum av umsóknum.
- Vísti á, at við hesum bygnaðinum eru tað 21 fólk, ið umsita gransking, men eingin beinleiðis granskan.

## Søgan um arbeiðssetningin

- Staðfestur tørvur á dagføring, m.a.
  - Stórar broytingar eru hendar á økinum í Føroyum og altjóða, meira samskipan av G&M, íløgur í inrfakervi, altjóða samfígging, Open Access krøv, etisk krøv
  - Økini gransking, menning og nýskipan ikki eru nógv væl lýst og samskipað yvirskipað og fyrisitingarliga, fleiri skipanir, sum yvirlappa
  - Skipanin við Vísindaráðnum virkar ikki nóg væl
  - Virkisøkið er víðkað við ES-granskingar- og menningarstarvi, staðsett hjá GRF
  - Grunnaásetingar - ivamál eru m.a. um rættindi í mun til afturbornar játtanir
  - Ráðs- og nevndarbygnaður og áseting av førleikakrøvum til limir
  - Heitið á lógini samsvarar ikki við innihaldið – hvat skal hon fevna um?

## Kappingarjáttanir í Føroyum í dag

- Granskingargrunnurin
  - Gransking og granskingargrundað menning
  - 7,5 mill. 2017
- Fiskivinnuroyndir
  - Gransking, menning og royndir
  - 8,5 mill. 2017
- Vinnuframi
  - Vinnunýskapan
  - 3,2 mill. 2017




## Skipanir í grannalondunum

- Sera ymiskar skipanir til somu uppgávur
- Ymisk amboð og treytir, tó at nógv gongur aftur
- Sera ymiskar játtanir & lutfall millum stovns og kappingarjáttanir
- Íløga í mun til BTÚ ymisk



## Noregi

- Forskningsrádet – ein samlað organisatión fyri gransking, menning og nýskapan – øll øki og allir sektorar – 8.872 mill NOK 2016 – hetta er uml ¼ av játtan til gransking í NO
- Innovasjon Norge – ein organisatión fyri vinnunýskapan – ráðgeving, stuðul og lán 3 700 mill kr NOK 2016
- 1,9 % av BTÚ til G&M í 2015




## Danmark

- Fleiri granskingarráð: Danmarks Grundforskningsfond, Det Frie Forskningsråd og fimm faklig granskingarráð. 425 mill + 1 200 mill kr í 2015
- Darmarks Innovationsfond – 1 407 mill DKK 2015
- 3 % av BTÚ til G&M í 2015



## Ísland

- RANNÍS - Ein samlað organisatión fyri gransking, menning og nýskapan, partvís eisini fyri útbúgving
- 2,2 % av BTÚ til G&M í 2015



## Tankar um skipan av arbeiði

- Skriva eitt álit/viðmerkingar, seinni verður lógarteksturin skrivaður
- 1. fundur: skitsa økið og endamálið upp
- 2. fundur: hugarok og raðfesting av uppgávum, evt. arbeiðsbólkar
- Praktiskt: Hvussu ofta skulu felags fundir verða, hvar savna vit skjøl, hvussu samskifta vit

# Fylgiskjal 5 – Notat um Vísindaráðið

**Forsøgan**

Skipanin við Vísindaráðnum kom í lógina 4. mai 2006. Í almennu viðmerkingunum[2] verður sagt soleiðis:

> *"Gransking hevur vaksandi týdning sum strategiskt amboð í samfelagsmenningini. Í hesum sambandi er neyðugt at gera bygnaðarligar broytingar á granskingarøkinum. Við uppskotinum er málið sostatt at skapa ein nýggjan bygnað fyri granskingarøkið. Visjónin er, at nýggi bygnaðurin verður høvuðsamboðið í framtíðar strategiska granskingarpolitikkinum og harvið almennu stuðulsveitingunum til gransking, menning og nýskapan.*
>
> *Tað er av stórum týdningi, at granskingin í Føroyum verður samskipað, og tað hevur týdning at byrja eina tilgongd fram ímóti einum felags granskingarumhvørvi, har vísindi og vinnuáhugamál skapa nýggj virði, og at játtanirnar til gransking verða samskipaðar. Eitt annað endamál við uppskotinum er at tryggja sambandið millum yvirskipaðu granskingarpolitisku strategiirnar, verkligu útinnanina av granskingarpolitikkinum og dagligu umsitingina av stuðulsskipanunum.*
>
> *Høvuðsbroytingin snýr seg um, at skipað verður eitt Føroya Vísindaráð, ið skal orða tann yvirskipaða strategiska granskingarpolitikkin, sum við felags hugsjón eigur at fevna um gransking, menning og nýskapan í Føroyum. Dentur verður lagdur á, at tann yvirskipaði granskingarpolitikkurin ikki fer í smálutir, men er ein karmur, har serlig høvuðsøki verða raðfest fyri ávíst tíðarskeið, samstundis sum fíggjarligu íløgurnar fylgja við. Til tess at leggja dent á og tryggja hesi fyrilit, verður í uppskotinum mælt til, at Vísindaráðið verður mannað við løgmanni og teimum landsstýrismonnum, ið varða av teimum fyrisitingarøkjum, ið hava við gransking at gera. Harafturat eru umboð fyri Fróðskaparsetrið og vísindaliga umhvørvið í Vísindaráðnum. Tað er umráðandi, at samband er millum vinnulívið og yvirskipaða granskingarpolitikkin. Tí verður vinnan eisini umboðað í Vísindaráðnum."*

Hetta er nærri greinað í serligu viðmerkingum og í hoyringarsvarunum.

Sambært lógini so skal Vísindaráðið orða yvirskipaða granskingarpolitikk Føroya við felags hugsjón, sum fevnir um gransking, menning og nýskapan.

Limirnir skulu vera: løgmaður, landsstýrismenninir í ávíkavist granskingarmálum, vinnumálum, innlendismálum, fíggjarmálum, fiskivinnumálum og heilsumálum, eitt umboð tilnevnt av Føroya Arbeiðsgevarafelag, eitt umboð tilnevnt av løntakarafeløgunum, eitt umboð tilnevnt av Fróðskaparsetri Føroya og tvey umboð fyri sektorgranskingarstovnar. Harumframt kann løgmaður tilnevna upp til 2 ráðslimir.

Løgmaður er formaður, og landsstýrismaðurin í granskingarmálum er næstformaður. Formaðurin í Granskingarnevndini hevur møtiskyldu í Vísindaráðnum, tó uttan at hava atkvøðurætt. Stjórin fyri Granskingargrunnin er skrivari hjá Vísindaráðnum.

Landsstýrismaðurin í granskingarmálum ásetur nærri reglur fyri vali av umboðunum fyri sektorgranskingarstovnarnar.

Vísindaráðið ger egna starvsskipan fyri ráðið.

---

[2] http://www.logting.fo/files/casestate/3751/075.05%20Gransking.pdf

**Íblástur til lógaruppskotið í 2006 og skipanirnar í dag**

Íblásturin til Vísindaráðið kom serliga úr Finnlandi, har tey í nógv ár hava havt eitt Science and Technology Policy Council[3], og úr Íslandi, har tey hava Vísinda- og Tøkniráðið[4].

Finska ráðið er sett saman soleiðis: Forsætisráðharrin er formaður. Mentamálaráðharrin og fíggjarmálaráðharrin eru varaformenn. Harumframt er ein ráðharri afturat tilnevndur av stjórnini. Umframt hetta tilnevnir stjórnin fimm aðrar limir til setanarskeiðið, sum er valskeiðið hjá sitandi stjórn. Limirnir mugu hava umfatandi serkunnleika um gransking, menning og nýskapan.[5]

Føstu limirnir í íslendska ráðnum í dag eru forsætisráðharrin, fíggjarmálaráðharrin, vinnumálaráðharrin og mentamálaráðharrin. Forsætisráðharrin tilnevnir tveir limir, harafturat verða 14 limir tilnevndir eftir tilmæli frá vísindaumhvørvinum, vinnuni og aðalráðum. Í verandi ráði eru umframt nevndu ráðharrar eisini fiski- og landbúnaðarmálaráðharrin, heilsumálaráðharrin og umhvørvis- og tilfeingismálaráðharrin limir.[6]

Líknandi ráð eru eisini í øðrum londum, tó ikki við politiskari umboðan. Í Danmark er nú talan um Danmarks Forsknings- og Innovationspolitiske råd, sum kom í 2014 í staðin fyri Danmarks Forskingspolitiske Råd.[7] Ráðið hevur 9 limir, tilnevndir av útbúgvingar- og granskingarmálaráðharranum vegna teirra persónligu eginleikar. Ráðið fær stuðul frá einum sjálvstøðugum sekretariati í Styrelsen for Forskning og Innovation.

Í Noregi er tað Forskningsrådet, sum gevur stjórnini tilmæli um langtíðarætlan á granskingarøkinum. Hetta er partur av grundarlagnum undir samtykta politikkinum, sum fevnir um tíðarskeiðið 2015-2024.[8]

**Vísindaráðið fór til verka í 2008**

Hóast samtykt í 2006, so fór Vísindaráðið ikki til verka fyrr enn í 2008. Hetta var helst orsakað av fleiri ymsum viðurskiftum, men eitt var vantandi greiða á, hvør skuldi dríva verkið, og eitt annað manglandi politiskur áhugi.

Fyrstu limirnir í Vísindaráðnum vóru tilnevndir í juli 2008.

Hesir vóru:
løgmaður, Jóannes Eidesgaard
landsstýriskvinnan í granskingarmálum, Kristina Háfoss
landsstýrismaðurin í uttanríkismálum, Høgni Hoydal
landsstýriskvinnan í vinnumálum, Bjørt Samuelsen
landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Karsten Hansen
landsstýrismaðurin í fiski- og tilfeingismálum, Tórbjørn Jacobsen
landsstýriskvinnan í løgmálum, Helena Dam á Neystabø
landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm

Harumframt tilnevndi landsstýriskvinnan í mentamálum hesar limir í Vísindaráðið:

---

[3] Science and Technology Policy Council (1987-2009), Research and Innovation Council (2009-) Kelda: http://blogs.helsinki.fi/changingdynamics/files/2014/01/STI_Policy_2014.pdf
[4] https://eng.forsaetisraduneyti.is/science-and-technology-policy-council/
[5] http://valtioneuvosto.fi/en/research-and-innovation-council/composition
[6] https://eng.forsaetisraduneyti.is/science-and-technology-policy-council/current-council/
[7] http://ufm.dk/forskning-og-innovation/rad-og-udvalg/danmarks-forsknings-og-innovationspolitiske-rad?set_language=da&cl=da
[8] https://www.forskningsradet.no/no/Langtidsplan_for_forskning/1182736860614

Bergur Poulsen, stjóri
Malan Marnersdóttir, professari, dr.phil. & ph.d.
Jan Arge Jacobsen, dr. scient., deildarleiðari

Marjun Patursson, bókavørður
Erland Viberg Joensen, ph.d. savnvørður

Við heimild í lógini tilnevndi løgmaður eisini tveir limir:

Hermann Oskarsson, stjóra
Sjúrður F. Olsen, ph.d. og dr.med.

Sum sæst, so vóru fleiri landsstýrisfólk enn tey, sum eru nevnd í lógini, tilnevnd, tí nýggj aðalráð vóru stovnað, síðani lógin varð samtykt.

Fyrsti fundur varð 28. november 2008. Tá hevði samgonguskifti verið, og nýggj politisk umboð komu fyri tey, sum formliga vóru tilnevnd, men ongantíð høvdu hitst á fundi.

Limirnir í Vísindaráðnum vóru frá 1. fundi:
løgmaður, Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýriskvinnan í granskingarmálum, Helena Dam á Neystabø
landsstýrismaðurin í uttanríkismálum, Jørgen Niclassen
landsstýrismaðurin í vinnumálum, Johan Dahl
landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard
landsstýrismaðurin í fiski- og tilfeingismálum, Jacob Vestergaard
landsstýriskvinnan í innlendismálum, Annika Olsen
landsstýriskvinnan í almannamálum, Rósa Samuelsen
landsstýrimaðurin í heilsumálum, Hans Pauli Strøm

Bergur Poulsen, stjóri
Malan Marnersdóttir, professari, dr.phil. & ph.d.
Jan Arge Jacobsen, dr. scient., deildarleiðari
Marjun Patursson, bókavørður. (seinni Andras Mortensen, tá Marjun Patursson fór úr starvi)
Erland Viberg Joensen, ph.d., savnvørður
Hermann Oskarsson, stjóri (tók seg úr ráðnum, áðrenn seinasta fundin)
Sjúrður F. Olsen, ph.d. og dr.med.

Í alt 16 fólk. Umframt hetta vóru Martin Zachariassen, formaður í Granskingarnevndini, Annika Sølvará, stjóri í Granskingarráðnum, og Petur Petersen, ráðgevi á Løgmansskrivstovuni, á fundi.

Á fyrsta fundinum 28. november 2008 var kunning um íslendska Vísinda- og Tøkniráðið, um Danmarks Forskningspolitiske Råd, um føroyska gransking sum heild og við hagtølum, um møguleikar við ætlaða ES-granskingarsamstarvinum og tankar um skipan, kveikingarmøguleikar og fígging av granskingarumhvørvinum framyvir. Aftaná var kjak um, hvørjir partar skuldu verða við í yvirskipaða granskingarpolitikkinum.

Fundir vóru síðani:

2. fundur – 23. februar 2009
Framløga var av útkasti til skabelón fyri granskingarpolitikk frá Granskingarnevndini. Eisini vóru framløgur frá granskarum og vinnuni. Vísindaráðið gav Granskingarnevndini afturmeldingar til at arbeiða víðari við

uppskotinum. Eisini var kjak um, hvussu granskingarpolitikkurin kann forankrast politisk. Uppskot til starvsskipan fyri Vísindaráðið varð samtykt.

3. fundur – 12. juni 2009
Uppskot til granskingarpolitikk fra granskingarnevndini varð lagt fram til viðmerkingar og kjak. Niðurstøðan á fundinum var, at formaðurin í Granskingarnevndini og stjórin fyri Granskingarráðið skuldu tillaga uppskotið og senda hetta til landsstýriskvinnuna í mentamálum. Hon skuldi síðani leggja hetta fyri landsstýrið til umrøðu, áðrenn eitt fullfíggjað uppskot skuldi leggjast fyri Vísindaráðið til hoyringar og seinni formliga støðutakan. Hetta skuldi eftir ætlan vera í seinnu helvt av august. Endurskoðaða uppskotið varð latið HDáN 15. september 2009.

4. fundur – 28. januar 2011
Skuldi eftir ætlan verða 8. oktober 2009, men orsakað av vantandi politiskari undirtøku fyri arbeiðinum varð hesin útsettur ferð eftir ferð. M.a. mælti landsstýriskvinnan í mentamálum vegna landsstýrið til at uppskotið hjá granskingarnevndini varð broytt, áðrenn tað varð lagt fyri Vísindaráðið, tí uppskotið frá granskingarnevndini var ov ótøkiligt.
Tað var eitt sera drúgt arbeiðið, sum varð lagt í endaliga uppskotið, sum varð broytt og tillagað fleiri ferðir, seinastu ferð heilt fáar dagar undan fundinum.
Á fundinum 28. januar 2011 var endalig góðkenning av yvirskipaða granskingarpolitikkinum, sum Granskingarráðið saman við formansskapinum hevði orðað lidnan eftir uppskoti frá Granskingarnevndini og Vísindaráðnum. Samstundis varð ein faldari við fleiri útgreiningum o.a. prinsippgóðkendur á fundinum. Politikkurin varð samtyktur undir yvirskriftini Vitan & Vøkstur. Yvirskipaði granskingarpolitikkur Føroya 2011-2015.

**Uppfylging**

Granskingarpolitikkurin varð lagdur fram á almennum tíðindafundi í Tinganesi í februar 2011. Í apríl 2011 sendi Mentamálaráðið eina áheitan til Granskingarnevndina um at arbeiða víðari við málinum.

> *"Heitt verður á Granskingarnevndina um at gera uppskot til eina útgreinaða arbeiðsætlan við neyvari tíðarætlan fyri arbeiði komandi 5 árini, ábyrgdarbýti, fíggjarligum metingum og uppskoti til raðfesting av átøkunum, sum eru neyðug fyri at seta politikkin Vitan & Vøkstur í verk.*
>
> *Tað er ásett í samtykta politikkinum, at arbeiðið við raðfestingum av økjum skal gerast í samráði við Vísindaráðið og eftir tilmæli frá Granskingarnevndini.*
>
> *Í hesum sambandi verður heitt á Granskingarnevndina at gera tilmæli um 5-10 raðfest granskingarøkir. Biðið verður um, at tað í tilmælinum verður greinað, hví hesi granskingarøkini eiga at vera raðfest, og at tað verður greinað, hvussu ein slík raðfesting kann verða sett í verk fíggjarliga og skipanarliga. Biðið verður um, at granskingarumhvørvið og vinnan verða tikin við uppá ráð, tá raðfestu økini verða vald.*
>
> *Tað eru ikki settir nýggir pengar av í fíggjarkørmunum fyri 2012 til átøk, so skulu fleiri pengar brúkast á einum øki, mugu hesir koma frá øðrum økjum, antin av Løgtingsfíggjarlógini ella úr grunnum uttanfyri Landskassan."*

Freistin varð sett til 31. juni 2011. Granskingarnevndin og fyrisitingin fóru undir hetta arbeiðið beinanvegin, men tað vísti seg skjótt, at tað ikki bar til at gera hetta so skjótt, sum ynski var um. Tað var serliga vantandi orka í Granskingarráðnum, sum var forðingin, men eisini at nógvir partar vóru við, og tað var trupult at savna fólk um arbeiðið.

Fyrsta uppskotið, sum varð gjørt eftir samskifti við allar granskingarstovnar og við vinnuna, varð lagt fram á fundi fyri umboð úr granskingarumhvørvinum í desember 2011. Her var breið semja um, at uppskotið mátti broytast munandi, frá at vera rættiliga fakspesifikt til breiðari evnir. Arbeiðið helt tí fram alt 2012. Í februar 2013 sendu Granskingarráðið og -nevndin endaligt uppskot um verksetan av granskingarpolitikkinum til Mentamálaráðið.

Uppskotið varð lagt fram á landsstýrisfundi í mars 2013. Síðani var ætlanin, at tað skuldi leggjast fyri Løgtingið til aðalorðaskifti. Hetta hendi ikki.

Síðani er einki formliga hent við politikkinum ella ætlanini um verksetan.

Løgmansskrivstovan hevur fleiri ferðir tikið stig til at fáa gongd á aftur arbeiðið við Vísindaráðnum. Í ljósinum av royndunum og vantandi viðgerðina av verandi politikki hevur Granskingarráðið mælt til at eftirhyggja skipanina, áðrenn alt apparatið verður sett í gongd aftur. Samskifti hevur eisini javnan verið millum Granskingarráðið og Mentamálaráðið um Vísindaráðið.

**Persónligar hugleiðingar um arbeiðið við Vísindaráðnum**

Sum stjóri í Granskingarráðnum havi eg verið sentralur partur í arbeiðinum við Vísindaráðnum. Úrslitið, politikkurin Vitan & Vøkstur, var eitt áhugavert skjal, sum uttan iva hevur havt ávirkan á politisku kósina seinnu árini, men sjálv tilgongdin var helst líka áhugaverd. Kjakið, sum var í Vísindaráðnum, og tær framløgur, sum vóru har, vóru við til at skapa eina breiðari fatan av gransking, menning og nýskapan, á tørvin, á nyttuvirðið og á kompleksitetin á økinum. Í hesum ljósinum eri eg sannførd um, at skipanin við Vísindaráðnum partvís hevði ta ávirkan, sum ætlanin var.

Tað er púra greitt, at arbeiðið við politikkinum og uppskotinum til verksetan ikki gekk sum ynskt í mun til tíðarætlan. Her eru fleiri tungtvigandi orsøkir:

- Ein ógreið skipan í mun til ábyrgdarbýti: Løgmaður er formaður, mentamálaráðharrin næstformaður, og skrivarauppgávan liggur hjá Granskingarráðnum. Tað vísti seg sera trupult at skipa arbeiðið munagott millum tríggjar almennar eindir.

- Vantandi fíggjar- og arbeiðsorka í Granskingarráðnum. Arbeiðið við Vísindaráðnum kravdi nógva orku av Granskingarnevndini og ikki minst av fyrisitingini. Hetta kom afturat øðrum uppgávum, samstundis sum tøka arbeiðsorkan í fyrisitingini minkaði orsakað av fleiri uppgávum við ES-granskingarsamstarvinum og skerdari játtan. Játtan var ikki tøk til at bjóða fólki úti frá at halda framløgur e.l.

- Manglandi politiskur áhugi. Tað vóru fyrisitingarnar, sum høvdu størsta áhugan í arbeiðinum, ikki politisku umboðini. Hetta er sama uppliving, sum vit hoyra um úr Finnlandi og Íslandi. Er politiski áhugin stórur, so virkar hetta arbeiðið væl, er hann minni, er arbeiðið munandi tyngri.

Samanumtikið er mín fatan, at ætlanirnar vóru góðar, men arbeiðið kundi gingið betri. Sumt av hesum ber til at lóggeva um og/ella avtala seg til, annað snýr seg um hugburð og áhuga.

Tað er eyðsýnt fyri mær, at tørvurin á samskipan av politikki á økinum er enn størri enn áður. Tað er tí mín greiða sannføring, at arbeiðið eigur at verða tikið uppaftur, men við eini endurskoðaðari skipan.

**Upplegg til kjak**

Arbeiðsbólkurin er biðin um í punkt 3 í arbeiðssetninginum at: "lýsa verandi skipan við Vísindaráðnum, serliga kjølfesting í mun til verksetan, og koma við tilmæli um tillaðingar."

Mælt verður til, at limirnir í arbeiðsbólkinum útfrá lýsingini frammanfyri og egnum royndum við líknandi uppgávum fyrireika seg til at kjakast um fylgjandi spurningar á fundinum:

> Halda tit, at verandi skipan við Vísindaráðnum kann/skal tillagast?
>
> Um so er: Hvat skal uppgávan/uppgávurnar vera, hvør skal vera við í ráðnum, og hvussu skal tað skipast, staðsetast og virka?
>
> Um ikki: Hvussu og hvør skal lyfta samskipandi og tvørgangandi uppgávurnar (strategi, málsetningar, skilmarkingar, infrakervi, hagtøl, felags regluverk v.m.)? Skal hetta savnast í einum aðalráði, ella skulu uppgávurnar leggjast til fleiri/ymisk aðalráð?

Mælt verður til, at limirnir umrøða spurningarnar við sítt bakland áðrenn fundin, so til ber at arbeiða fram ímóti einum fyrsta uppskoti til nýggja skipan, sum kann seta út í kortið yvirskipaða ætlan fyri gransking, menning og nýskapan í Føroyum.

Undan hesum kjakinum verður framløga um íslendska Vísinda- og Tøkniráðið. Neyvari kunning um hetta kemur.

Skrivað: Annika Sølvará – til fund hjá arbeiðsbólkinum 7.9.2017

# Fylgiskjal 6 – Framløga um álitið fyri landsstýrinum 29. januar 2018



## Endurskoðan av lóg um gransking

## Bakgrund

- Lóg um gransking frá 2001 við broytingum í 2006
- Skipanin við Vísindaráðnum virkar ikki nóg væl
- Altjóða samstarv ikki partur av lógini, hóast kjarnuuppgáva í dag
- Tilmæli frá Vísindaráðnum í 2011 um at samstarva í nógv størri mun
- Nógv broytt á økinum úti í heimi í mun til gransking, menning og nýskapan
- Karmar at stuðla vinnugransking eru ikki nøktandi

## Arbeiðið

- Arbeiðsbólkur tilnevndur í mai, 9 umboð fyri aðalráð, vinnuna, Fróðskaparsetrið og Granskingarnevndina, umframt formansskapin og skrivstovuna, í alt 14 fólk
- Fyrsti fundur 22. mai, higartil 7 fundir + arbeiðsfundir ímillum
- Semja um fleiri evni, men ymisk sjónarmið á nøkrum økjum
- Arbeiða við 3. uppskoti til tilmæli nú

## Arbeiðssetningur

- Viðgera lógina um gransking í mun til verandi og framtíðar tørv og karmar
- Lýsa verandi skipan við Vísindaráðnum, serliga kjølfesting í mun til verksetan, og koma við tilmæli um tillagingar
- Endurskoða nevndar- og ráðsbygnaðin og áseta førleikakrøv til ymsu liðini í skipanini fyri at tryggja armslongdar prinsippið
- Viðgera lógina í mun til altjóða samstarv, serliga ES-granskingarsamstarvið og norðurlendskt samstarv, herundir spurningar um samfígging og samskipan av verkætlanum, netverk v.m.
- Viðgera spurningin um løgfrøðiligu støðuna hjá Granskingargrunninum og hinum stuðulsgrunnunum/-játtanunum serliga í mun til støðling av játtan, mvg-afturbering v.m.
- Gera uppskot til fyrisitingarligan bygnað fyri øki, harundir møguliga samanlegging/samskipan av stuðulsgrunnum/-játtanum.

## Tilmæli – m.a.

- Nýggja rammulóg um gransking, menning og nýskapan (GM&N)
- Avtaka Vísindaráðið og stovnseta nýtt ráð fyri GM&N við betri kopling til politisku skipanina og aðalráðini
- Áseta yvirskipaða heimild í lógina at velja stýri, nevndir og ráð. Áseta førleikakrøv og lýsa og skilmarka hugtøk
- Áseta endamál, greiðar heimildir og seta mál fyri altjóða samstarvi um GM&N. Samskipa nationala og altjóða granskingararbeiðið
- Kanna grunna- /stovnsspurningin gjølligari. Áseta yvirskipað, einsháttað regluverk fyri allar stuðulsskipanir í nýggju rammulógini.
- Styrkja fyrisitingina og áseta í lógini, at tað skal vera møguligt at savna fleiri ella allar verandi fyrisitingar á økinum í eina størri eind, sum fevnir um ráðgeving, altjóða samstarv, fyrisiting av stuðli v.m.

## Væntað arbeiðsætlan

- Endaligt tilmæli handast í februar
- Minni arbeiðsbólkur setast at gera lógaruppskot
- Hoyring í vár
- Uppskot klárt at leggja fyri Løgtingið fyrst í komandi tingsetu

# Fylgiskjal 7 – Slóðir til ymiskt viðkomandi tilfar

## Lógir um gransking, menning og nýskapan

Lóg um granskingarráð frá 1996 við broytingum 1999 (avtikin) www.logir.fo/Logtingslog/56-fra-20-05-1996-um-granskingarrad-sum-broytt-vid-logtingslog-nr-22-fra-21-april

Lóg um gransking 2001 við broytingum 2006 www.logir.fo/Logtingslog/85-fra-15-05-2001-um-gransking-sum-broytt-vid-logtingslog-nr-33-fra-4-mai

Lóg um Vinnuframagrunn 2001 www.logir.fo/Logtingslog/81-fra-08-05-2001-um-Vinnuframagrunn

Lóg um Fiskivinnugrunn 2017 www.logir.fo/Logtingslog/71-fra-29-05-2017-um-Fiskivinnugrunn

Danmark - Lógir um Danmarks Forsknings- og Innovationspolitiske Råd og Danmarks Frie Forskningsfond og nógv annað www.retsinformation.dk/Forms/R0310.aspx?nres=1&res=142

Noregi - Norges Forskningsråd lovdata.no/dokument/INS/forskrift/2016-06-10-658

Ísland - Lög um opinberan stuðning við vísindarannsóknir www.althingi.is/lagas/nuna/2003003.html

## Skipanir í grannalondunum – Gransking, menning og nýskapan

Noregi

Forskningsrådet www.forskningsradet.no/

Høvuðstøl 2016 www.forskningsradet.no/no/Artikkel/Forskningsradet_i_tall/1254016730246

Innovasjon Norge www.innovasjonnorge.no/

Umrøða IN no.wikipedia.org/wiki/Innovasjon_Norge

Danmark

Um donsku skipanina á FI ufm.dk/publikationer/2016/filer/tal-om-forskning-og-innovation-2015.pdf

Íslandi

Rannis en.rannis.is/activities/

Science and Technology Policy Council eng.forsaetisraduneyti.is/science-and-technology-policy-council/

Svøríki

Vetenskapsrådet www.vr.se

VINNOVA www.vinnova.se

### OECD hagtøl

data.oecd.org/rd/gross-domestic-spending-on-r-d.htm

### Allýsingar o.a. í dk lógaruppskoti um videnskabelig uredelighed m.v.

www.ft.dk/samling/20161/lovforslag/L117/index.htm#dok
www.ft.dk/samling/20161/lovforslag/l117/html_som_fremsat.htm

### Persónsupplýsingarøkið og Data sharing

www.nature.com/news/we-must-urgently-clarify-data-sharing-rules-1.21350

### Javnstøða

ufm.dk/forskning-og-innovation/internationalt-samarbejde/europaeiske-samarbejder/det-europaeiske-forskningsrum/ligestilling?searchterm=ligestilling

### Open Access til útgávur og dátur

Føroyar – Granskingarráðið www.gransking.fo/fo/granskingargrunnurin/studul-til-gransking/open-access/

Danmark
ufm.dk/forskning-og-innovation/samspil-mellem-viden-og-innovation/open-access?searchterm=open%20access

Svøríki
vr.se/forskningsfinansiering/sokabidrag/forutsattningarforansokningarochbidrag/openaccess.4.1d4cbbbb11a00d342b0800021800.html

### Faklig meting av umsóknum

Granskingarráðið: www.gransking.fo/fo/granskingargrunnurin/meting-av-umsoknum/

Svøríki vr.se/forskningsfinansiering/beredning/beredningsprocessen.4.d66864d107fadedb908000129.html

og
vr.se/forskningsfinansiering/beredning/beredningsprocessen/bedomningskriterierochbetygsskala.4.48d441ad1363c4c099a8d5.html

### Um granskingarintegritet

Danska kodeksið – 2015 ufm.dk/publikationer/2015/den-danske-kodeks-for-integritet-i-forskning

Danski samandrátturin – 2015 ufm.dk/publikationer/2015/sammenfatning-af-den-danske-kodeks-for-integritet-i-forskning.pdf

Europeiska kodeksið – 2011 ec.europa.eu/research/participants/data/ref/h2020/other/hi/h2020-ethics_code-of-conduct_en.pdf

Europeiskar vegleiðingar RRI um etikk www.rri-tools.eu/ethics

Finska kodeksið - 2012 www.tenk.fi/en/archive/new-guidelines-responsible-conduct-research

Íslendskar leiðreglur – Háskúli Íslands english.hi.is/university/code_ethics

Norskar leiðreglur – 2014 www.etikkom.no/forskningsetiske-retningslinjer/

Norskur tjekklisti www.etikkom.no/forskningsetiske-retningslinjer/Forskningsetisk-sjekkliste/

Svenskar leiðreglur – 2011 (endurskoðaðar) publikationer.vr.se/en/product/good-research-practice/

Føroyskar leiðreglur - mett verður, at tað ikki er ráðiligt at fara undir at gera umfatandi reglur á føroyskum. Í staðin verður mett, at heimildir eiga at ásetast í komandi lógini til at gera leiðreglur og eftirlits- og kærumyndugleika. Føroyskar leiðreglur eiga at ásetast, sum eru grundaðar á altjóða reglur og góðan granskingarsið. Mælt verður til, at Granskingarráðið átekur sær samskipandi leiklutin vegna Mentamálaráðið at orða slíkar leiðreglur í neyvum samstarvi við granskingarumhvørvi.

## Skráseting av útgávum

Tað finst einki samlað yvirlit yvir útgávur hjá granskarum í Føroyum. Í grannalondunum er hetta alment krav. Dømi um skipanir eru Den Bibliometriske Forskningsindikator DK og Cristin NO

ufm.dk/forskning-og-innovation/statistik-og-analyser/den-bibliometriske-forskningsindikator

Arbeitt verður við eini felags norðurlendskari loysn, the Nordic List.